# á veg til Spania



*Útsýnið yvir Tinganes er gott av dekkinum á Norrönu*



*Døtrarnar Anna og Sigrun, konan Brita og vinmaðurin Jens Christian Guttesen søgdu Eli farvæl á bryggjuni*



*Ung stjørnuskot undirhildu um borð á Norrönu*

meg akkurát sum ein elefant í eini porselensfabrikk. Eg royndi at hava allar sansir opnar, og so mitt í tí heila endaði eg á einum sporvognaspori, og fólk løgdu til merkis, at her var ein, sum rættuliga hevði skitið í dansin!

Eina ferð í allari trongdini fekk eg eyga á eitt skilti, har áskriftin var „RING“. Tá legði eg nógv fyri at fylgja hesi leiðini, og at enda eydnaðist at sleppa næstan út um býin, men eg endaði í eini síðugøtu. Hetta var ikki so galið kortini, tí her kundi eg hvíla eitt sindur. Eg parkeraði og fór at keypa inn í einum supermarknaði. Tá ið eg var liðugur, gjørdi eg av at sova her í gøtuni. Men so fór eg at hugsa, hvat fólk mundu fara at halda, tá ið tey sóu ein so stóran og merkiligan bil standa her.

Kanska tey fóru at halda, at hetta var ein terroristabilur, sum var fullur av spreingievnum! Eg sá fyri mær, at stór brynjað politistalið fóru at herja á bilin, og at eg fór at verða handtikin í berum undirbuksum og trýstur inn í salatfatið! Eg tók knappa avgerð, stakk av og setti kós móti París. Skjótt fóru vit báðir um franska markið.

Nú líkasum bilurin koyrdi av sær sjálvum. Hann er jú ættaður her frá, so eg setti bara sjálvstýrarin til, og so treiv eg í at syngja onkra franska strofu!

Tað regnaði nógv, meðan eg koyrdi suðureftir. Men tað var vakurt at skoða stóru víddirnar. Eg eri ikki førur fyri at siga, hvat tað var fyri vøkstur á hesum fyri mær ókendu víddum. Men eg veit, at tá ið eg fari at stevna norður yvir aftur, so fer meiri vøkstur at verða at síggja, og eg kendi, at tað gjørdist alt meiri lýtt. Í tvær nætur svav eg í Fraklandi, áðrenn eg kom til baskarabýin San Sebastian og eg fyri fyrstu ferð tær atlantisku Pyreneurnar.

Framhald



*Mitt inni í Bruxelles endaði Eli á einum sporvognaspori við stóra bilinum …*